

## Vinnandi venjari

Jan Pytlick veit, hvat tað er at vinna – á hægsta stigi. Hann hevur ført danskan kvinnuhondbólt upp á tindarnar í Olympiskum leikum og Euromeistaraskapi. Hann er heiðraður fyri at duga væl at menna spælarar, at coacha og at samskifta. Vit fáa vitjan av Jan Pytlick og spyrja hann um, hvat skal til fyri at blíva heimsins best, hvat hann krevur av sær sjálvum og sínum spælarum, og hvussu hann motiverar spælarar til at avrika nakað heilt serligt umaftur og umaftur.



## Breckmann og Tobbi

Teir hava stríðst á frontinum í hugsjónarliga kjakinum. Hvassir og eirindaleysir í kjaki í fleiri áratíggjund. Óli Breckmann og Torbjørn Jacobsen tosa um at kjakast, um politiskt stríð og um at samstarva sína millum. Og so spyrja vit, hvat teir halda um hvønn annan



## Tær tora

Tær ger tað, sum nógvar kvinnur blíva flóvar av bara at hugsa um. Tær ummæla sexleikur á føroyskari heimasíðu. Vit tosa við Maluna Eyðunsdóttir, Súsannu í Stórustovu og Elin í Stórustovu um, hví tær tora at ummæla sexleikur, og hvat fólk halda um tað.



## Terji spælir Føstufressar

Terji Rasmussen spælir live í sendingini hesaferð. Terji trívur í nakrar sangir hjá Føstufressum, sum fingu heiðursløn fyri bestu tónleikaútgávu í fjør á Planet Awards. Eisini verður tosað við Terja um lívið sum tónleikari.

# hvonn ★★★★★ LIVE

# Leygarkvøldið

26. februar 2011 kl. 20.00

Royal hárfríðkan · Coca-Cola · 2 Rás títt radio · Atlantic Airways · Carlsberg